

*Jógvan Jespersen heldur tað ikki vera undrunarvert, at tað koma tvær rokningar frá sjón- og útvarpi, hóast tey nú eru ein stovnur*

# 1 miðil – 2 gjøld

## Hóast sjónvarpið og útvarpið eftir 1. januar í ár gjørdust ein stovnur, so eru føroyingar aftur í ár noyddir at gjalda tvær rokningar

SJÓN- OG ÚTVARPSGJALD

*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*

Sjónvarpið og útvarpið gjørdust á nýggjárinum ein stovnur. Tí undrar tað fleiri, at føroyingar aftur í ár verða noyddir at gjalda tvær rokningar. Eina til sjónvarpið og eina til útvarpið, hóast hvørgin stovnur í grundini er til longur.

### Einki er broytt

Jógvan Jespersen, stjóri á nýggja miðlastovninum, sigur, at tað ikki er nakað, fólk skulu undrast á.

– Hóast stovnarnir vórðu lagdir saman á nýggjárinum, so er framvegis einki broytt í umsitingarliga partinum. Tí krevja vit tað sama í 2005, sum í 2004. Í kunngerðini, sum kom í desember stendur einki um gjald, og tað verður tí ikki broytt, fyrr enn lógin kemur, sigur Jógvan Jespersen, stjóri.

So hóast stovnarnir eru lagdir saman, so fungera teir framvegis sum tveir stovnar. Tí verður tað eisini kravt inn á sama hátt sum í 2004.

Sjónvarpið krevur 1600 kr + mvg, t.v.s. 2000 kr, sum skulu verða goldnar innan 1. mars, og útvarpið krevur 1300 kr + mvg, t.v.s. 1625 kr, sum skulu verða goldnar innan 1. mei. Samanlagt ein rokning áljóðandi 3625 kr til tveir stovnar, ið longu eru farnir í søguna.

### Navnið

Spurdur um tað gongur nakra leið við t.d. navninum á nýggja stovninum, svarar Jógvan, at hann í fer at leggja eitt uppskot fram.

– Talan verður um eitt uppskot um 1. stig í tilgongdini til nýggja stovnin. Ætlanin er, at viðgerðin av uppskotinum skal byrja í seinnu helvt av januar í ár. Tá verða allar ætlanir, eisini um navnið, lagdar fram, sigur Jógvan Jespersen at enda.

# 456.872 kr um telefonina

## Kl 10.30 hósmorgunin táttaði stuðulin, sum Reyði Krossur hevur fingið um telefonina, í hálva millión



Øll vilja stuðlað teimum neyðstøddu, tað sæsta á øllum brøgdum. Og skipanin, sum Føroya Tele hevur sett í verk, tykist at hava fingið sera góða undirtøku. Nærum ein hálv millión, ella 456.872 kr vóru hósmorgunin kl. 10 komnar inn á kontoina. Og talið bara veksur fyri hvønn tíma, ið fer.

### Stuðlið eisini við sms-boðum

Higartil er telefonstuðulin komin til vega á tann hátt, at fólk hava ringt til nummar 905656, og harvið automatiskt latið 100 kr, sum verða lagdar afturat telefonrokningini.

Men nú er, umframt stuðulsnummarið 905656, ein nýggj skipan komin, sum ger, at fólk eisini kunnu sms'a stuðul til Reyða Kross.

Við at senda sms við tekstinum »RK 25«, »RK 50« ella »RK 100« til 1441, ber til at stuðla við ávikavist 25, 50 ella 100 kr.

Longu nú eru tey mong, ið hava nýtt høvið at stuðla á henda hátt eisini.

Fylgjast kann við hvussu innsavningin gongur, og hvussu upphæddin veksur, m.a. á www.portal.fo, har tølini allatíðina verða dagførd. Her sæst tó bert upphæddin á telefoninnsavningini, ikki samlaði stuðulin, sum Reyði Krossur hevur fingið.

Tað samlaða talið er nú farið upp um eina millión.

– eys –



**Toyota Avensis 2.0 Linea SOL AUT** — 6 mánaða garanti
**Skrásetingarnr.:** RE 645 **KM:** 132.000
**Árgangur:** 09.10.02 **Seinast sýnaður:** 09.10.02
**Viðmerking:** Klimaanlegg - El rútar - El spegl - Fjarstýrt sentral lás - tokulyktir - Tónaðar rútar aftan - Fløguspælara - 4 Air bags - ABS - VSC
**Kr. 178.000,-**



**Toyota Corolla 1.6 Terra L/B** — 6 mánaða garanti
**Skrásetingarnr.:** FT 188 **KM:** 103.000
**Árgangur:** 05.04.00 **Seinast sýnaður:** 11.03.04
**Viðmerking:** Fløgu spælara - el rútar framman - el spegl - sentral lás - krók
**Kr. 97.000,-**



**Toyota Corolla 1.8 STW 4x4**
**Skrásetingarnr.:** RK 242 **KM:** 73.000
**Árgangur:** 16.03.98 **Seinast sýnaður:** 13.01.04
**Viðmerking:** 4x4 - tak boylar - el rútar - el spegl - sentral lás - band spælara
**Kr. 82.000,-**



**VW Polo Classic 1.9 Diesel**
**Skrásetingarnr.:** GP 675 **KM:** 200.000
**Árgangur:** 01.01.97 **Seinast sýnaður:** 19.04.04
**Viðmerking:** Bandspælara - sentral lás
**Kr. 45.000,-**



**Toyota Avensis 1.8 SOL AUT.STW.** — 6 mánaða garanti
**Skrásetingarnr.:** DG 270 **KM:** 15.000
**Árgangur:** 02.07.03 **Seinast sýnaður:** 02.07.03
**Viðmerking:** Klimaanlegg - el rútar - el spegl - fjarstýrt sentral lás - regn sensor - automatiska niðurblending av bakspegli - tokulyktir - hiti í setrunum framman - leður rætt V/radio stýring - leður gear knøtt - fløgu og band spælara - avtakiligan krók
**Kr. 254.000,-**



**KIA Sephia 1.5**
**Skrásetingarnr.:** BS 416 **KM:** 47.000
**Árgangur:** 06.11.00 **Seinast sýnaður:** 09.02.04
**Viðmerking:** Sentral lás - el rútar - el spegl - fløguspælara
**Kr. 67.000,-**

Fyrivarni verður tikið fyri møguligum prentvillum.



**Toyota Corolla 1.3 XLI GINZA**
**Skrásetingarnr.:** SB 550 **KM:** 100.000
**Árgangur:** 03.04.96 **Seinast sýnaður:** 09.09.03
**Viðmerking:** Rustviðgjørdur - Bandspælara - Alu felgur
**Kr. 62.000,-**



**Mitsubishi Carisma 1.9 SEDAN** — 6 mánaða garanti
**Skrásetingarnr.:** HV 230 **KM:** 51.000
**Árgangur:** 19.03.02 **Seinast sýnaður:** 19.03.02
**Viðmerking:** El rútar Framman - El spegl - Fjarstýrt sentral lás - Fløguspælara - AC - Hiti i setrum - fartpilot - Rust viðgjørdur 15-03-02
**Kr. 148.000,-**



**Skoda Fabia 1.4 STW** — 6 mánaða garanti
**Skrásetingarnr.:** TJ 968 **KM:** 20.000
**Árgangur:** 12.09.01 **Seinast sýnaður:** 12.09.01
**Viðmerking:** El rútar - el spegl - radio - píkadekk - Sentral lás - tokulyktir
**Kr. 95.000,-**



**Nissan Almera GX**
**Skrásetingarnr.:** YP 912 **KM:** 142.000
**Árgangur:** 13.02.96 **Seinast sýnaður:** 29.09.04
**Viðmerking:** El spegl - fløguspælara - píkadekk
**Kr. 42.000,-**

6 mánaða garanti

**Vit bjóða nú 6 mánaða garanti uppá bilar, ið kosta meira enn 85.000,-**
Garanti skipanin, ið hevur eina sjálvsábyrgd uppá kr. 500,-, fevnir um allar knappliga íkomnar feilir, ið eygsæð ikki skyldast nýtslu brúkarans, rust, uttanífrákomnir skaðar ella væntandi tænastueftirlit.
Eingin gandur og eingir smáir bókstavir.
Kom og vitja okkum · landsins fremstu bilasølu.

Vegurin Langi • Hoyvík • Tel. 353040 • Fax 353041
rs@reyniservice.fo • www.reyniservice.fo

REYNI SERVICE P/F